# Klostur í 800 ár

Longu fyri 1200 árum síðani hoyrdi ein fyrstu ferð um Utstein, tá staðið var nýtt sum kongsgarður hjá Haraldi Hárfagra. Góð 400 ár seinni, umleið 1260, varð Utstein Kloster bygt, men óhugsandi er ikki at partar av tí kunnu vera eldri enn tað. Serligur áhugi er fyri kirkjuni, hvørs torn er sett miðskeiðis millum kórið og skipið. Teir 12 munkarnir á staðnum hoyrdu til augustinara-ordanin, og høvdu stranga disiplin við regluligari bøn, bíbliulestri og messum. Eftir trúbótina búði eingin í klostrinum í langar tíðir, og fall klostrið um hetta mundið í órøkt. Men í 1750 flutti Christopher Garmann inn higar og setti tað í stand. Í 1900 vórðu kórið og tornið restaurerað, og restin í 1950'unum. Í dag verður tað rikið sum savn, eitt stað til ráðstevnur, bólkar og konsertir.






















